Klikkheys stuttligast at tekna

- Tað er fyrstu ferð, eg havi teknað til eina føroyska barnabók, og tað hevur avgjørt verið ein avbjóðing, sigur Hanni Bjartalíð, listamaður.

Í komandi viku ber til at síggja tekni ngarnar, sum eru gjørdar til tríggjar nýggjar upprunaføroyskar barnabøkur. Framsýningin er í Smiðjuni í Lítluvík

FRAMSÝNING
Turið Kjølbro

Týsdagin og mikudagin í komandi viku verða myndir úr trimum nýggjum upprunaføroyskum barnabókum sýndar fram í Smiðjuni í Lítluvík. Bøkurnar talan er um eru Í Geyma eftir Dánial Hoydal, sum Hanni Bjartalíð hevur myndprýtt, Geistasteinar sum Edward Fuglø hevur myndprýtt, og Margreta og mjólkin, sum Bárður Oskarson hevur myndprýtt. Samstundis letur framsýning upp við øðrum verkum hjá Hanna Bjartalíð.

Hanni Bjartalíð er útbúgvin á Nordiska Kostskolan í Kokkola í Finnlandi, har hann starvast sum listamaður. Hann hevur sýnt nógv fram í Føroyum, á ólavsøku, várframsýningum, norðoyastevnu, og í Smiðjuni í Lítluvík. Eisini sýnir hann javnan fram uttanlands, serliga í Danmark og Finnlandi.

Við á framsýningini í Smiðjuni í Lítluvík hevur hann oljumálningar og grafikk. Hanni Bjartalíð arbeiðir nógv við smáum myndum, og tí vera eini 50-60 myndir við.

- Eg arbeiði ofta við eini tesu, sum eg geri eina myndarøð burturúr. Á myndunum royni eg so at lýsa ta upplivingina, sum liggur til grund fyri tesuna.

- Prosessin at mála er nógv meiri umráðandi fyri meg enn tað endaliga úrslitið. Tá ið myndin so er liðug, eru allir tankarnir, sum eru millum meg og myndina, burtur. Seinastu framsýningarnar hjá mær hava ikki verið so kommersiellar. Tær hava verið rættiliga alternativar og bera dám av altjóða list.



Myndir til bókina, Í Geyma

Bundin og tó

Bókin Í Geyma, sum Hanni hevur teknað til, er rættiliga nógv øðrvísi enn barnabøkur vit kenna. Og Hanni dylir ikki fyri, at tað hevur verið ein avbjóðing at gera myndirnar til bókina.

- Hetta er fyrstu ferð eg havi teknað til eina heila bók, og skal eg vera erligur, hevur tað ikki verið ein løtt uppgáva. Ikki minst tí, at so nógvir persónar eru í bókini, sum eg má læra at kenna fyri at kunna tekna teir. Tekningarnar eru gjørdar í samstarvi við høvundin, og tað í sjálvum sær hevur bundið meg eitt sindur. Høvundurin hevur havt eina ímynd um, hvussu persónarnir skulu síggja út, men hann hevur kortini givið mær fríar teymar og hevur góðkent míni hugskot. Ein teknari til barnabøkur má leggja seg upp at høvundinum. Tað hevur verið spennandi, ikki minst tí, at hetta er ein rættiliga nógv øðrvísi barnabók, sigur Hanni Bjartalíð, sum hevur teknað til bókina síðani seinasta summar.

Persónarnir í bókini hava nøvn, vit vanliga brúka sum tiltak, kúllur, gellan, skræðugák, kánus og so framvegis.

- Sjálvur hevur mær dámt best at teknað Klikkheys. Hann er tann fríasti, rennur runt og skrálar upp, sigur Hanni Bjartalíð.

Hanni Bjartalíð er ungur listamaður, sum longu hevur gjørt vart við seg við sermerktum stíli.

- Summi leggja meg undir at vera naivistur, men tað eri eg als ikki hóast tað minnir um.

Hann hevur ein gest við úr Finnlandi, Anna Seppala, sum er 27 ára gomul. Hon sýnir fram grafisk verk á framsýningini, sum verður opin frá týsdegnum og restina av vikuni.

Hanni Bjartalíð er ungur listamaður, sum longu hevur gjørt vart við seg við sermerktum stíli

whazzzup!!!

Forrige · Næste · Svar · Svar alle · Videresend · Flag · Udskriv · Rediger · Slet · Ombryd igen · Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Janhild Svabo Blum, New Zealand, janhild@blum.co.nz
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Vinnur The Lord of the Rings?

Verður *The Lord of the Rings* (Ringenens Herre) sigursharri, tá ið Oscarvirðislønarnar verða latnar?

Og ein ringur at vinna yvir allari kapping. . .
New Zealandarar eru ikki heilt ólíkir føroyingum, tá ið tað kemur til altjóða kapping, í so máta, at alt landið fylgir við, tá onkur sær út til at fara at klára seg væl. Øll ganga nú spent og bíða eftir Oscarkvøldinum tann 24. mars 2002. New Zealandski leikstjórin Peter Jackson, leikstjóri av filminum "Heavenly Cratures" við Kate Winslet, er farin har ongin annar hevur torað at fara fyrr, nevniliga at filmatisera meistarverkið hjá Tolkien: *The Lord of the Rings.* Hetta vísir seg at hava loyst seg, tí fyrsti partur í eini røð av trimum filmum, *The Lord of the Rings: The Fellowship of the Ring,* hevur vunnið ikki færri enn 13 Oscar nomineringar. Hetta kann samanlíknast við "Titanic" og "Borte med Blæsten", ið hvør vunnu 14 Oscar nomineringar.

Upptikin á meira enn 100 ymiskum økjum í New Zealandi, hendan fasinerandi søgan, er ein av teimum filmum, ið fólk hava verið mest spent eftir at síggja hetta ártíggju. Peter Jackson, og hansara hold av meira enn 2000 hjálparum, brúktu eitt gott ár uppá at fáa hesa søguna um "Middle Earth" á skermin. Alt var ógvuliga loyniligt, meðan upptøkan fór fram. Ongin visti, hvar tað gekk fyri seg, hóast nógv royndu at lúra seg framá. Tað var rættiliga spennandi at fara á Café í Wellington - man visti ongantíð um man fór at renna seg inní onkran kendan, so sum Elijah Wood ella Liv Tyler. So stoltir eru New Zealendarar av filminum, at tá ið New Zealandska premieran av filminum varð hildin í Wellington, varð Wellington býur næstan ókenniligur. Serliga býráðið gjørdi nógv av, og broytti fleiri vegaskeltir í býnum. Millum annað stóð tað "Welcome to Middle Earth" á skeltum, har vanliga stóð "Welcome to Wellington". Sjálvt fartelefonfyritøkurnar broyttu sendararnar, so at á fartelefonini stóð, at man var í "Middle Earth" heldur enn í Wellington.

Fra tí vakra landslagnum til álvar, dvørgar og gandarar, *The Lord of the Rings* er fyltur við "special effects", so tað er ikki óvæntað, at hesin filmurin er ein av teimum fremstu í kappingini at vinna Oscar fyri "cinematography" og "visual effects".

Harafturat hevur Peter Jackson hevur eisini vunnið ta stóru æru, at verða nomineraður sum besti leikstjóri, ímeðan filmurin sjálvur er nomineraður, sum besti filmur.

So fer *Lord of the Rings* at verða sigursharri Oscarkvøldið? Vit ganga spent og bíða.

Tá ið Tvøroyrar kommuna seldi Rankan:

Ivi um hægsta reella boð

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Í sambandi við, at nýggja kommunulógin forðar kommunum at eiga og reka vinnufeløg, spurdi eitt felag á Tvøroyri kommununa, um ætlanin var at privatisera partafelagið, sum eigur Rankan.

Jú, hetta var ætlanin, segði kommunan og vísti felagið tí sín áhuga at keypa skipið.

– Sjálvandi selir Tvøroyrar kommuna Rankan til tann, hon vil, men sannleikin og framferðarhátturin eigur at koma fram, heldur felagið, sum í fyrstu atløgu hevði hægsta boð og í aðru atløgu var tað einasta, sum hevði skrivliga váttan um veðhaldini hjá kommununi.

Málið útsett

– Á fundi vid flestu kommunustýrislimirnar í november, vórðu eini átta áhugaði feløg kunnað um, hvussu kommunan ynskti at avvikla Rankan. Treytirnar vóru: 1. at skipið framhaldandi skuldi hoyra heima á Tvøroyri, 2. at kommunan skuldi loysast frá øllum veðhaldum og 3. at keyparin skjeyt inn nýggjan partapening. Tíðarfreist varð sett, og øll feløgini, sum høvdu áhuga, skuldu koma við einum útspæli.

Felagið, sum Sosialurin hevur tosað við, fekk eina áheitan frá fakfeløgunum í Tvøroyri um at bjóða saman við teimum.

– Hetta mettu vit at vera ein stóran fyrimun fram um aðrar, og hildu vit, at vit fóru at fáa skipið, men vit gjørdust klókari. Eg handaði okkara uppskot, sum vit høvdu havt hjálp frá sakførara at evna til. Nevndarformaðurin, sum var einsamallur á skrivstovuni, breyt brævbjálvan upp, meðan eg var hjástaddur, las boðið og segði síðan, at málið var útsett.

Umboðið fyri felagið, sum bar nevndarformanninum brævbjálvan, hoyrdi einki aftur um boðið, teir høvdu latið.

– Seinni havi eg frætt, at vit høvdu hægsta boð, og at tað var orsøkin til, at einki spurdist burturúr.

Bjóðast av nýggjum

– Men so komu aftur boð frá býráðnum um, nú skuldi bjóðast av nýggjum, og nú hevði kommunan sakførarar, Sigmund Poulsen, at standa fyri søluni. Tær treytir, sum bjóðast skuldu eftir, vóru stórt sæð avskrift av okkara fyrra boði. Men nú kravdi kommunan skrivliga váttan frá banka um, at kommunan varð loyst frá øllum veðhaldum og tann, sum setti mest pening í, skuldi fáa skipið.

Tá ið boðini vórðu latin upp, vóru tey bert trý í tali.

– Tað eina felagið bjóðaði 4,6 milj. krónur við ongari skrivligari váttan um, at kommunan slapp undan veðhaldum, eitt annað felag bjóðaði 4,5 milj. krónur og hevði heldur onga váttan. Okkara boð var 4,0 milj. krónur – saman við eini skrivligari bankaváttan uppá góðar 2 milj. krónur fyri veðhaldini hjá kommununi.

Felagið, sum ikki fekk Rankan, men í fyrstu atløgu hevði hægsta boð, og í aðru atløgu var tað einasta, sum hevði skrivliga váttan um veðhaldini, spyr:

– Hvat var nú hægsta reella boðið?

Kommunan og fakfeløgini

Sakførarin hjá kommununi metti 4,6 milj. krónur at vera hægsta boð, tí hann helt, at bankaváttanin uppá veðhaldini kundi avgreiðast aftaná, hóast kravt varð, at váttanin skuldi fylgja við boðnum

– Sjálvandi selir kommunan til tann, hon vil, men eg haldi, at sannleikin og framferðarhátturin eigur at koma fram. Ein annar spurningur er, hvussu slíkt kann henda á Tvøroyri, og hvussu tað ber til, at fakfeløgini ikki fáa uppbakking frá kommununi, sigur felagið, sum kennir seg ikki sørt vónbrotið.

Finnleif Guttesen, býráðsformaður á Tvøroyri:

Bankin segði, allir vóru skikkaðir

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Tað er framvegis partafelagið, P/F Vørðan á Tvøroyri, sum eigur djúpvatnstrolaran, Rankan.

Finnleif Guttesen, býráðsformaður, sigur, at tað, sum er hent, er, at partapeningurin í felagnum er øktur, soleiðis at kommunan nú er minnilutaeigari og hevur 2 av 5 nevndarlimum í felagnum.

– Sjálvandi kann onkur vera harmur, tí tað ikki eydnaðist at keypa meirilutan í felagnum fram um ein annan, men sakførari okkara helt, at sjálv trygdin um at loysa kommununa úr veðhaldsskyldunum var eingin trupulleiki. Sakførari hevði fingið at vitað frá lánistovnunum, at allir, sum høvdu bjóðað, vóru skikkaðir keyparar á tann hátt, at feløgini vóru væl fyri fíggjarliga. Hinvegin er rætt, at skrivlig váttan skuldi fylgja við boðnum.

Hægsta boð

Finnleif Guttesen sigur, at tá ið feløgini, sum høvdu bjóðað, øll vóru skikkaðir keyparar, valdi kommunan at taka av hægsta boðnum.

Hann vísir á, at tað, sum kommunan vildi, var at gera ein parteigarasáttmála, har kommunan ikki átti meirilutan – ein sáttmála, sum samstundis tryggjaði, at felagið ikki kann avhendast uttan víðari.

– Málið var at varðveita skipið og arbeiðsplássini í kommununi, sigur Finnleif Guttesen, býráðsformaður.

Finnleif Guttesen, býráðsformaður á Tvøroyri, sigur, at tá ið feløgini, sum høvdu bjóðað, øll vóru skikkaðir keyparar, valdi sakførarin at taka av hægsta boðnum.